# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Nýggju liðini hava kløkkað




*Hóast KÍ hevur havt góðan byrða seinnu umførini, so mugu teir ásanna, at javnleikirnir eru dýrir, tá sigrarnir geva trý stig*

**Meistararnir úr NSÍ hava enn eina ferð mint á, hvussu torført tað kann vera at fóta sær hjá liði, sum hevur vunnið FM fyri fyrstu ferð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið var 9. umfar í bestu fótbóltsdeildini avgreitt. Harvið er fyrsti triðingurin av kappingini farin afturum. Fyrsta umfarið í næsta triðinginum verður ikki fyrrenn annað vikuskiftið. Formuladeildin heldur frí í vikuskiftinum. Tað kemst av landsdystinum, sum verður í Estlandi mikukvøldið í næstu viku.

Ikki uttan orsøk plagar at verða tikið til, at tað er torført at standa seg hjá liðunum, sum eru flutt upp, og tað plagar eisini at verða sagt, at tað ofta hilnast illa hjá liði, sum hevur vunnið FM fyri fyrstu ferð.

Um mett verður út frá úrtøkuni í fyrsta triðinginum av kappingini, so passar fyrra útsøgnin ikki so væl, sum hon ofta hevur gjørt, meðan seinna útsøgnin passar væl betri enn tann fyrra.

B68 og ÍF eru uppflytarar. Felags fyri liðini er, at tey hesa ferð taptu við einum máli ímóti favorittunum úr høvuðsstaðnum. Tað er eisini felags fyri tey bæði eysturoyarliðini, at tey eftir fyrsta triðingin av kappingini ikki eru í vanda fyri at flyta niður, og at tey í einstøkum umførum hava víst nakað av tí besta fótbóltsundirhaldinum, sum higartil hevur verið at sæð.

Í fjør flutti AB niður við 17 stigum, og í fyrraárið flutti B68 niður við 18 stigum. Úrtøkan hjá ÍF og B68 hevur higartil verið ávikavíst 10 og 11 stig. Sum gongdin higartil hevur verið hjá teimum báðum niðastu, so kann tað væl hugsast, at tað fyri at sleppa undan niðurflytingini verður neyðugt at skava kanska 17-20 stig saman. Harvið ber til at ímynda sær, at B68 og ÍF eftir fyrsta triðingin av kappingini hava savnað meiri enn helmingin av tí, sum skal til hjá teimum fyri at røkka málinum, sum tey hava sett sær fyri hetta kappingarárið. Tað er at sleppa undan at flyta niður.

Hjá meistarunum í NSÍ hevur tað gingið striltið. Vónin at endurvinna FM heitið tykist eftir fyrsta triðingin av kappingini ikki at skula verða veruleiki. Eftir ellivu umfør er NSÍ ellivu stig aftanfyri EB/Streym. Hugburðurin hjá meistarunum tykist framvegis vera góður, men leikliga restar nógv í FM taktirnar frá í fjør. Hóast gongdin ikki hevur verið nakað serlig, so bendir avgjørt einki á, at støðan skal verða, sum hon var eitt nú hjá B71 árið eftir, at sandoyingar høvdu vunnið fyrsta og higartil einasta FM heitið. Tá flutti B71 niður!

Undanfarnu árini hava nógvir venjarar fingið sekkin. Í fjør stóðu feløgini mest sum í bíðiröð fyri at siga venjararnar úr starvi. Tað er merkisvert, at tað eftir fyrsta triðingin av kappingini framvegis eru teir somu tíggju, sum hava ábyrgdina.

Sambært omanfyri standandi so kundu tað kanska verið tey bæði botnliðini og meistararnir, ið vóru besta boðið upp á at skifta venjara. Einki bendir kortini á, at hesi feløgini hugsa um at skifta venjarar.

## Sagt í 3. hálvleiki

Ein partur av triðja hálvleiki á Rás2 eru SMS-boð frá lurtarunum. Í tann mun at tíðin røkkur, verða hesi boð lisin upp í sendingini. Og bestu SMS'ini verða eisini prentað í mánadagsútgávuni av Sosialinum.

Bid John William ùr Kì gevast vid øllum hasum umberingunum.Sjàlvandi hava tey størstu feløgini ungar evnarikar leikarar. Men teir mugu royna at fàa okkrt burturùr teimum, og ikki bara tosa og tosa. Annars heilsa Dan frà nàbùgvanum nidri undir har sum hann byr, fra HB-fan nr. 1 ;-) «

Red lions hja hb er eitt fantastiskt ahaldandi fjepparafelag. Stort ros til red lions uttan tykkum einki liv i. Heilsan frensurin «

Hevdi jakup a borg ik sa so gott ut, hevdi han fingid reytt kort fyri hevnd a bartal «

Spoylara? ùtgreina tad«

I eysturoynni bruka tey spoilarar a bilinum. Forrestin hava tey eisini wunderbaum:-) «

Var domarin imoti IF aftur i dag?«

Martin, ultras elskar teg«

Sambært Portalinum fekk Wellington reytt kort fyri at sparka leikara nidur. So sigast mà, at bønin hjà Eli Hentze er hoyrd hjà dòmarunum.

Come on heri,tù gloymdi at spyrja hvussu omma levi æt?«

Rodrigo Silva uh ah i wanna knooow, how you score that Goal...!;-) Heilsan Ott«

Lat okkum hoyra ein eb/streyma sang. LEKKIRT at vera eb/streyma fjeppari í hesum døgum :)«

Hvar kom ta reyda kortid ì dag, var ta ik har sum venjari grenjar um at dòmarin :-)«

NSI = Nògv Serbiskt Iskoyti. Uha nu er langt sidani vit taptu, minnist ikki hvussu tad følist. Vit eru a rættari kòs. Besti dystur hja Hedin i ar. Go KI«

Hvi fær Bartal eitt so lætt gult kort? Ju, ti nu hevur hann karantenu aftur, hvørjum kriterium døma domarinir eftir? Ti spyrji eg Eiler: hvat var munuri a ti vemmiligu taklingini fra ti fyrrverandi landslidsleikarinum Chr. H. moti ti nyggja Aka Petersen - skuldi verid beinleidis reytt!!«

Eg havi bert ein spurning til if ? Hvi grenja teir so òluksàliga illa ? harragud kunnu teir ik verda eitt sindur rògligari har afturi ì verjipartinum :-o ?«

Super at b68 tapti, b36 tad betra lidid,buuu b68:-)«

Spell tad ikki gekk Skàla eiga allan fyrra hàlvleik hinir skora, Rùni ? Puha. Go Skàla Go Skàla fjeppari:-)«